## Mótmæltu hvalaveiði

Tað hevur elvt til øði nógvastaðni, at Japan hevur sent fleiri hvalabátar suður í Íshavið at veiða stórhval. Í gjár skipaðu djóraverndarfelagsskapir fyri einum mótmælistiltaki uttan fyri japonsku sendistovuna í Melbourne í Avstralia. Mótmælisfólkini løgdu eina kvinnu oman á eitt japanskt flagg. Kvinnan var reyðmálað sum tekin um blóðugu hvalaveiðina. Tann nýggja avstralska stjórnin hevur hvassliga funnist at japonsku hvalaveiðini.



## Umvælast í Litava

Í síðsta mánað sigldi íslendska farmaskipið Axel á land við bygdina Höfn í Hornafirði. Síðani skipið fekst avaftur, hevur tað ligið á Akureyri, har skaðin er umvældur fyribils. Tann veruliga umvælingin skal gerast á einari skipasmiðju í Litava, og Axel er nú á veg hagar. Tað kostar millum 10 og 20 mió. danskar krónur at umvæla skaðan, og arbeiðið verður ætlandi liðugt í næsta mánað. Farmurin fekk eisini skaða, tá skipið fór á land.

# Samfelagið missir tá ið flotin liggur



*- Tað merkist, tá ið eingin fiskur kemur upp á land, skipini liggja við bryggju, og gólvini á fiskavirkjunum eru turr, ásannar landsstýrismaðurin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Tað er fiskiflotin og fiskavirkini, sum standa fyri meginpartinum av okkara útflutningi, og tí er greitt, at samfelagið missir nógv, tá ið flotin liggur, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

VERKFALL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Landsstýrið fer ikki at blanda seg upp í sáttmálatrætuna, sum er millum fiskimenn og reiðarar um nýggjan sáttmála. Vit fylgja við gongdini og fegnast um, at partarnir nú eru farnir at tosa saman aftur.

Tað sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Hann er fullgreiður yvir, at bæði reiðarar, fiskimenn, fiskavirkir, fiskafólk og samfelagið alt missir nógvan pening, nú flotin liggur og hevur ligið síðan 19. desember.

### Eingi tøl

- Hvussu stórur missurin er, sum tíðin gongur, veldst sjálvsagt um, hvussu fiskiskapur, veður og fiskaprísir høvdu vignast. Tí er torført at seta neyv tøl á, men vit vita, at var alt, sum vanligt, høvdu fleiri skip havt loyst longu 3. jóladag, og tá høvdu fólk á fleiri fiskavirkjum longu verið farin til arbeiðis fyrsta gerandisdag í árinum.



Hinvegin er eisini greitt, vísir landsstýrismaðurin á, at ein stórur partur av ísfiskaflotanum kortini hevði havt ligið um jóla-og nýggjárshalguna.

*- Vit fara ikki at blanda okkum í sáttmálastríðið, og eg taki ikki støðu til trætuna, sigur landsstýrismaðurin, sum fegnast um, at partarnir eru farnir at tosa saman aftur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Og tó.

- Vit sóu um hesa tíðina í fjør, at tey skip, sum fóru fyrst útaftur eftir jól, bæði fiskaðu væl og seldu fyri miljónir, leggur hann aftrat.

### Tað merkist

Hóast trupult er at seta tøl á, hvønn týdning tað hevur, at flotin nú hevur ligið í 17 dagar, ásannar Bjørn Kalsø, at tað merkist, tá ið eingin fiskur kemur upp á land, skipini liggja við bryggju, og gólvini á fiskavirkjunum eru turr.

- Eitt er, hvat mist verður í beinleiðis inntøkum. Annað er, hvat tað merkir upp á longri sikt, at fiskavirkir og útflytarar annars kanska ikki megna at halda gjørdar sáttmálar og avtalur um levering, sigur landsstýrismaðurin.

### Blandar seg ikki

Landsstýrismaðurin tekur ikki støðu til sáttmálastríðið og leggur dent á, at hetta er ein spurningur, sum partarnir mugu loysa við framhaldandi samráðingum.

Hann fegnast um, at samband aftur er millum partarnar og vónar, at vit fara at síggja eina loysn innan alt ov nógvar dagar.

- At síggja til hevur langt verið millum feløgini, og samráðingarnar stóðu í botni. Tí fingu vit verkfall. Nú er so líkt til, at glið er við at koma á aftur, og tað fegnist eg sum landsstýrismaður um, sigur Bjørn Kalsø.

# Gudrun 30 krónur kilo fyri besta toskin

**Í gjár fóru einir 4-5 bátar úr Klaksvík og ein úr Hvannasundi til útróðrar við línu. Hesir bátar eru ikki raktir av verkfalli**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Útróðrarbáturin Gudrun í Klaksvík, sum var við línu hósnáttina, fekk sløk 5.000 pund av toski og hýsu, sum teir seldu á uppboðssølu hósmorgunin. Teir seldu veiðina fyri miðalprísin 24,60 krónur fyri kilo.

Besti prísur fyri toskin var 30 krónur fyri kilo, og fyri bestu hýsuna fingu teir 23,80 krónur fyri kilo.

Gudrun hevði soleiðis eina góða sølu, nú fiskiskipaflotin annars liggur.

### Feitur og góður

Virkini, ið keyptu veiðina hjá Gudrun, vóru Valhalla, Fiskavirkið í Gøtu og Rainbow Seafood.

Umleið helmingurin var hýsa og hin helmingurin toskur.

Úr Klaksvík verður sagt, at fiskurin var bæði feitur og góður.

Hósdagin fóru einir 4-5 bátar úr Klaksvík og ein úr Hvannasundi til útróðrar við línu.

Spennandi verður at síggja, hvussu fiskiskapurin fer at vignast, og hvussu sølan hjá bátunum verður í dag.

Hesir bátar eru ikki raktir av verkfallinum hjá Føroya Fiskimannafelag.

*Útróðrarbáturin Gudrun seldi hósmorgunin fyri miðalprísin 24,60 krónur fyri kilo*

*Mynd: Skipalistin*

